# Sersáttmáli millum

**P/f Thor Fisheries**

Og

**Føroya Fiskimannafelag**

Viðvíkjandi m/s Hoyvík, TN 90

Millum omanfyri nevndu partar er í dag gjørd henda semja:

Manningin á Hoyvík skal avroknast soleiðis:

1. Tá skipið fiskar ídnaðarfisk í Norðsjónum, skal skipið ganga eftir sáttmálaásetingunum fyri ídnaðarskip – í løtuni við einum býtisprosenti á 27,0.
2. Tá skipið fiskar makrel, sild og svartkjaft, skal skipið ganga eftir sáttmálaásetingunum fyri nótaskip – í løtuni við einum býtisprosenti á 17,5.
3. Semja er um, at reiðaríið rindar feløgunum avgreiðslugjald fyri sáttmálan, svarandi til limagjaldið hjá hvørjum einstøkum felag.
4. Viðvíkjandi felagsfisking ella "joint fishing" (partroling ella fiskiskip/móttøkuskip) skal býtast soleiðis, at Hoyvík í mesta lagi fær 70 prosent av avreiðingarvirðinum.
5. Felagsreglurnar í høvuðssáttmálanum millum manningarfeløgini og Føroya Reiðarafelag eru galdandi.

Manning, sum er mynstrað eftir sáttmála við Føroya Fiskimannafelag, skal umframt sáttmálaásetta býtið hava 4000 krónur um dagin til javnbýtis. Hetta skal skiljast soleiðis, at um til dømis seks limir hjá Føroya Fiskimannafelag eru mynstraðir, skulu teir hava 4000/6 krónur = 666,67 krónur í part um dagin. Eru fýra limir hjá felagnum mynstraðir, fáa hesir 4000/4 krónur = 1000 krónur í part um dagin.
Um Føroya Fiskimannafelag ger avtalu við onnur reiðarí um somu viðurskifti, men har ásetta dagpeningaupphæddin er lægri enn 4000 krónur um dagin, verður upphæddin í hesum sáttmála tillagað samsvarandi.

Hesin sersáttmáli er galdandi til ársenda 2017.

Hesin sersáttmáli er skrivaður í tveimum eintøkum – eitt til hvønn partin.

Tórshavn 6. januar 2017

**Føroya Fiskimannafelag**

Jan Højgaard, formaður

**p/f Thor Fisheries**

Hans Andrias Frímann Kelduberg